# Fíggjarlóg við undirskoti

**Báður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, legði í gjár fram uppskotið til Løgtingsfíggjarlóg. Hann roknar við einum undirskoti upp á góðar 276 milliónir**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Reiíliga ein kvart milliard í undirskoti. Tað er úrslitið, Bárður Nielsen, landsstyrismaður við fíggjarmálum sá fyri sær, tá hann legði fíggjarlógina fyri 2004 fyri Løgtingið.

Undirskotið er mett til at verða 276,6 millionir krónur, verður sagt í almennu viðmerkingunum til fíggjarlógina, sum varð løgd fyri Løgtingið í gjár.

Inntøkurnar á fíggjarlógaruppskotinum eru mettar at geva 3 milliardir og 374 milliónir krónur, og útreiðslurnar 3 milliardir og 650 milliónir krónur.

Av inntøkunum verða skattir og avgjøld mett at geva 2 milliardir og 744 milliónir, og ríkisstuðulin er 630 miliónir.

Útreiðslurnar veðra býttar millum rakstur, sum er 3 miliardir og 362 milliónir, løguútreiðslur, sum eru 249 milliónir og rentuútreiðslur, sum eru settar til 39 milliónir.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at hallið er alt ov stórt, men vísir á, at til ber ikki at gera tað øðrvísi undir teimum fyritreytum, sum givnar eru. Lækkandi konjunkturir eru orsøkin, sigur Fíggjarmálaráðið í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið.

Høvuðsorsøkirnar til hetta eru tvær, verður sagt. Tær eru lækkandi fiskaprísir á heimsmarknaðinum og ILA sjúkan, sum gjørdi um seg í føroysku alivinnuni. Eisini hevur lági dollarakursurin verið viðvirkandi til gongdina, verður sagt.

Peningurin, sum brúkast skal á fíggjarlógini, er raðfestur í stóran mun til almanna- og heilsumál. Høvuðsraðfestingarnar fara til eldrarøkt og serforsorg. Býli til heimleys. Nýggja bygningin á Landssjúkrahúsinum. Kommunulæknaútbúgving og -skipanina. Tiltøk at basa fiskasjúkum. Havbúnaðarroyndir og jarðfrøðiligar kanningar, verður sagt í viðmerkingunum.

Íløgurnar, sum gjørdar verða, eru tær flestu tær somu sáttmálabundnu, sum vóru í uppskotinum hjá undanfarnu samgongu, sigur Fíggjarmálaráðið í viðmerkingum sínum til fíggjarlógaruppskotið.



*Báður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum, eru millum teirra, sum varða av fíggjarlógaruppskotinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Strúkiorkestrið hjá Tónlistaskúlanum í Kópavogi vitjar í Føroyum um vikuskiftið. Tey fara at hava konsertir í Christianskirkjuni og í Norðurlandahúsinum*

# Ungir strúkarar úr Íslandi

**Leygardagin og sunnudagin fer eitt strúkiorkestur frá Tónlistaskúlanum í Kópavogi at hava konsert í Klaksvík og í Havn**

KONSERTIR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Strúkiorkestrið hjá Tónlistaskúlanum í Kópavogi er mannað við 12 ungum tónlistafólkum í aldrinum 13 - 16 ár. Eisini eru 2 gentur við, 19 og 22 ára gamlar, sum spæla floytu í eini konsert av Vivaldi saman við strúkarum og cembalo.

Tónleikurin hesi ungu úr Íslandi hava at bjóða er fjølbroyttur. Fyrst spæla tey nakað fyri violin og klaver, síðani cello og klaver og nøkur stykkir fyri strúkiorkestur, eitt nú The Toy Symphony av Leopold Mozart, har nakrir av næmingum frá Klaksvíkar Tónlistaskúla luttaka við at spæla "leikutøj". Tey spæla Carmen suituna av Bizet og enda við Vivaldi.

Fyrra konsertin verður í Christianskirkjuni klokkan 16 leygardagin, og sunnudagin klokkan 16.00 spæla tey í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Har spæla tey eisini nøkur stykkir saman við strúkiorkestrinum hjá Tórshavnar Musikkskúla, sum fyri stuttum hava havt eina væleydnaða konsert undir leiðslu av Bernhard Wilkinson.

Kópavogur og Klaksvík eru vinarbýir, og er hetta aðru ferð, at eitt orkestur haðani vitjar Klaksvíkina.

# Várkonsert við ungum stjørnum

**Leygardagin fara næmingar úr tónleikaskúlunum kring landið, saman við lærarum sínum, at hava konsert í Listaskálanum**

Musikkskúlanæmingar úr Havn, Fuglafirði, Klaksvík, Vágum og av Sandi, fara saman við lærarum úr Musikkskúlunum, at hava konsert í Listaskálanum.

Tað er ókeypis atgongd til konsettina, sum verður leygardagin 27. mars klokkan 16.00 í forhøllini í Listasavni Føroya í Gundadali.

Ungu tónleikararnir eru millum 8 og 18 ára gamlir..

- Vit hava roynt at funnið nýggj talent fram, sum vit rokna við at koma mynda ein part av føroyska tónleikalívinum í framtíðini, sigur Martin Mouritsen, musikkskúlaleiðari.

Yngsti næmingurin, ið er við á hesari konsertini, er 8 ára gamla Birgit Sivertsen úr Klaksvík, sum hevur spælt violin síðani skúlársbyrjan í fjør.



*Skráin hjá hesum ungu, millum 8 og 18 ára gomul, er fjølbroytt, eitt nú framføra tey einleik á ymisk ljóðføri, so sum blokkfloytu, floytu, klaver, violin og trombone*

Skráin hjá hesum ungu er fjølbroytt, eitt nú framføra tey einleik á ymisk ljóðføri, so sum blokkfloytu, floytu, klaver, violin og trombone.

Ein messingkvintett úr Havn verður eisini við. Teir eru, Dávur Magnussen, trombone, Niklas Mouritsen, waldhorn, Tróndur Herason Olsen, trompet, Glenn Samuelsen, tuba og Kenneth Jones, trompet.

Tónleikurin vit fara at hoyra er eftir tónaskøld úr barokktíðini, teirri klassisku- og romantisku tíðini, nevniliga Bach, Handel, Hook, Chopin, Debussy, Fauré, Bizet og Brahms.

Lærarar í musikkskúlaskipanini skipa fyri konsertini, og tað er Katja Volevelskja, ið er tónleikalærai í Havn og í Eysturoynni, sum er "primus motor" til hetta tiltakið.

Hini ungu, ið fara at vísa síni kynstur í Listaskálanum leygardagin eru: Katarina við Skipá, floytu, Merry Eyð Jacobsen, violin, Høgni R. Hansen, blokkfloytu og Elin R. Hansen, floytu.

Andrias Olsen, klaver, Heiðrun Petersen, violin, Mathias og Sanna Kapnas, klaver og violin, Oluf Dam, klaver, Kamilla Ravnsfjall, floytu, Kristina Dalsgarð, klaver og Heini og Martin Mouritsen, trompet og klarinet.

ítróttur
Nr. 60 • fríggjadagur • 26. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# FC Keypmannahavn og OB víðari í donsku steypakappingini

**Hvørki Todi Jónsson ella Jákup á Borg vóru við á liðnum hjá sær, tá ið bæði FC Keypmannahavn og OB spældu seg í fjórðingsfinaluna í donsku steypakappingini mikukvøldið**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mikukvøldið gjørdist greitt, hvørji lið hava spælt seg í fjórðingsfinalurnar í donsku steypakappingini í fótbólti, tí sonevndu DONG-Cup. Liðini hjá teimum báðum føroyingunum í bestu donsku deildini, Todi Jonssón og Jákup á Borg, megnaðu bæði at vinna á útivølli.

### Jákup bleiv sílaður frá

Fyrr í vikuni skrivaðu vit, at Jákup á Borg fór at verða við í hópinum til steypadystin móti 1. deildarfelagnum Ølstykke, men tá ið alt kom til alt, bleiv Jákup sílaður frá. Hópurin hjá OB til tann dystin taldi upprunaliga 19 mans, men bleiv síðani skorin niður til 15 mans, og tá var tað millum annað Jákup, ið bleiv vigaður og funnin ov léttur. OB leikti á útivølli móti Ølstykke, og talan gjørdist um eina sera málríkan og undirhaldandi dyst, sum tað í síðstu løtu eydnaðist OB at vinna 5-4! Vandamikli OB-framherjin Steffen Højer, ið annars var ivasamur undan dystinum, skeyt fýra tey fyrstu málini hjá OB, men týdningarmiklasta málið gjørdi tó ein annar maður, Søren Berg, tá ið hann stutt fyri leiklok skoraði sigursmálið til 5-4. FC Keypmannahavn, sum ikki hevði Toda Jónsson í hópinum, var eisini á útivølli í Farum, har teir leiktu móti superligaliðnum FC Nordsjælland. Liðið hjá Toda vann dystin 4-2, og sambært donskum fjølmiðlum var talan um eitt framúr gott avrik frá FC Keypmannahavn, sum var ógvuliga sannførandi, hóast onkrir leikarar blivu spardir. Serliga var tað suðurafrikanska stjørnan, Sibousisu Zuma, ið var óvanliga væl upplagdur. Todi Jónsson er so smátt komin fyri seg, og í dag skal hann leika á eykaliðnum hjá FC Keypmannahavn, ið skal spæla dyst móti eykaliðnum hjá arvafíggindunum Brøndby.

### Gott lutakast fyri FC Keypmannahavn

Á miðdegi hósdagin var lutakast um, hvussu leikast skal í fjórðingsfinalunum. Her má sigast, at FC Keypmannahavn var rættuliga heppið, tí teir skulu á útivølli leika móti 2. deildarliðnum Skive, ið verður mett sum veikasta liðið, ið er eftir í kappingini.

Jákup á Borg og OB vóru ikki eins hepnir og Todi Jónsson og hansara liðfelagar, tí OB skal á útivølli leika móti oddaliðnum í 1. deild, AC Horsens, har føroyski landsliðsleikarin, Johan Byrial Hansen, til dagligt leikar. Hetta kann gerast ein rættuliga trupul uppgáva hjá OB, tí AC Horsens hevur verið rættuliga sannførandi alt kappingarárið.

Fjórðingsfinalurnar í donsku steypakappingini verða leiktar Skírishósdag 8. apríl, og sjálv finalan verður leikt á heimavøllinum hjá FC Keypmannahavn, Parkini, Kristi Himmalfaradag 20 maj.




*Todi Jónsson og liðfelagar hansara í FC Keypmannahavn skulu í fjórðingsfinaluni í donsku steypakappingini leika á útivølli móti 2. deildarliðnum Skive*
*savnsmynd*

# Árliga Várkappingin í Runavík 27. mars

**tíðindaskriv**

Leygardagin 27. mars kl. 14.00 skipar Roysnið fyri triðju rennikappingini í ár, Várkappingini í Runavík.

Hendan kappingin hevur verið fastur táttur í kappingarskránni fyri frælsan ítrótt seinastu árini. Tey, ið hava roynt seg, hava vanliga fingið eina góða tíð á einari slættari og skjótari 10 km rutu.




Eins og undanfarin ár verður byrjað omanfyri Miklagarð. Runnið verður úteftir til Sjómansheimið, har sneitt verður oman á keiina. Síðan verður runnið inn eftir Gulasteinsvegi og niðan á vegin áraka Føroya Banka, har sneitt verður úteftir aftur. Henda leið skal rennast góðar 9 ferðir. Seinastu ferð koma rennararnir á mál við Sjómansheimið.

### Luttøkutreytir

Luttaka í kappingini kunnu kvinnur og menn, ið eru fødd í 1989 ella fyrr. Kappast verður á 10 km hjá monnum og kvinnum. Eisini er ein bólkur fyri veteranar, t.v.s. tey, ið eru fødd í 1958 ella fyrr.

### Tilmelding

Tilmelding fer fram her á www.athletics.fo innan fríggjakvøldið kl. 20.00. Startnummar verður avheinta við Runavíkar Sjómansheim kappingardagin millum kl. 13.00 og 13.45.

### Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr. 30,- fyri hvønn, ið verður goldið, tá startnummari? verður avheintað kappingardagin.

### Heiðursmerki

Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í bólkunum:

- kvinnur (f. 1959-1989)
- kvinnur veteranar (f. -1958)
- menn (f. 1959-1989)
- menn vetaranar (f. -1958)